## Góð løn til læknar

50.000 norskar krónur í vikuløn! Tað er ikki at forsmáa! Hetta tilboðið verður nú sett donskum læknum taka av. Læknatørvurin í Noregi er so stórur, at norskar vikarstovur kunnu bjóða læknunum hesa ovurhonds stóru lønina. 50.000 norskar krónur svara til einar 55.000 føroyskar. Tað er kortini ikki bert í Noregi at tørvur er á læknum, tí hetta sama ger seg eisini galdandi í Danmark. Men eitt slíkt tilboð úr Noregi man uttan iva freista nógvar danskar læknar - og møguliga eisini føroyskar læknar. Einasta treyt fyri at fáa lut í tilboðnum er, at læknin er undir 70 ár, hevur danskan ríkisborgararætt, danska útbúgving og skuldi búgva uttanfyri Noregi 1. januar í fjør.

## Surfing gevur tunglyndi

Er samanhangur millum net-surfing og tunglyndi? Tað er í øllum førum ikki óhugsandi, siga enskir granskarar. Teir staðfesta, at tess longri tíð ein brúkar á alnótini, tess minni eru sannlíkindini fyri at ein gerst eydnusamur. Men um ein fær tunglyndi av at surfa nógv á netinum, ella um fólk við tunglyndi verða bundin av alnótini, tora teir ikki at staðfesta. Granskararnir við stovnin fyri sálarliga vísind á Lærda Háskúlanum í Leeds vísa á, at alnótin hevur stóran leiklut í lívinum hjá nútíðar menniskjanum. Men fyrimunirnir verða eisini tætt fylgdir av eini daprari síðu. 1300 bretar í aldrinum 16 til 51 ár luttóku í kanningini. Granskararnir brúktu júst alnótina at fáa samband við øll hesi fólkini.

# vifeilum



Erika Lómstein Petersen, skrivari á Ílegussavninum



Gunnar Mohr, stjóri í Íløgufelagnum 14



Randi Kürberg, hjálparlærari leggur einum eldhugaðum luttakara lag á

eg javnan ivist í, og tað vildi eg havi uppá pláss. Eisini trongdi eg til at fáa uppfrískað onkra av mál- lærureglunum frá skúlatíðini, sigur Erika, sum dámar væl hendan máta at læra seg at stava.



Joen Remmer, flogskipari

– Hetta við at sita í bólkum riggar øgiliga væl, tí vit kunnu sita og diskutera ymiskt og hjálpast at. Og so hava vit tað rættiliga stuttligt eisini, sigur Erika, sum heldur ikki ivaðist, tá hon hoyrdi um hetta skeiðið

– Hetta var akkurát tað, eg havi bíðað eftir. Eg havi fleiri ferðir ætlað mær at fari á til dømis Føroyamáls-deildina fyri at læra føroyskt betri, men tá man hevur fulltíðararbeiði, er tað ikki so lætt at fáa tað at passa inn. So hetta var júst tað, eg hevði brúk fyri, sigur Erika.

*Tekstbrotini eru úr lærubókini "Snarskeið í Stavseting" hjá Jonhardi Mikkelsen*

## Hugsháttur – einki ð

Tá ið tú ynskir, at eitthvørt, tú onga ávirkan hevur á sjálvur, skal verða veruleiki.

Vanliga brúkt, tá ið tú heilsar fólki, ella tá ið tú tekur dýran til.

| | |
|---|---|
| **Heilsan:** | Jesus fylgi tær<br>Gud signi mítt føðiland<br>Gævi (Gud gevi) at alt gekst væl<br>Hann leingi livi |
| **Eiðir:** | Fanin brenni<br>Devilin turki |

## Lúnsk einsljóðandi orð

Við hvørt renna tvey orð saman í framburði. T.d burtur úr sagnorðinum at gera

fáa vit hann ger. Hetta sagnorðið ger rennur saman við navnorðinum ein gerð.

Hann ger eina góða gerð. Hann fer sína ferð í morgin. (Men tá ið vit baka ella

bryggja, brúka vit ger.)

Vanliga er tað soleiðis, at navnorðið fær ð.

## Royn teg nú

**Hetta er teksturin, luttakarnir á skeiðnum sótu og rættaðu í gjárkvøldið. Royn og vita, hvussu nógvar feilir tú finnur, og fá svarið í blaðnum í morgin**

– Yes, babe – hon blotnaði eisini tá ið eg segði „babe". Eg hevði snarað fastir um lítlafingur síðan eg var smádrongur. Hon hevði longst eftir tiltaluni „babe" alt lívi til fánýtis – at eg segði tað nam við onkrar serligar hjartastrongir.
Hon skonkti og so pakkaði hon upp. „Hilmar
! Hilmar! my hero – hevur tú keypt mær hesa?"
– Yes, babe.
Hon drønaði in í kamari og kom út aftur sum fullrigga. Sum klipt úr Kvinnu.
Blusin sat sum stoypt á hesum lítla skropnaði kroppinum. Hevði hon brúkt push-up og rætt ryggin eitt vet hevði hon sæð út sum ein 18 ára gomul.
18 ár heilt upp til har húðin kom undan hálsinum. Tá var hon ikki 18 meira. Longur upp tú komst longur komst tí burtur frá 18. Hon snerktist upp longur upp tú komst. Og so hevði hon brillur við dubultum gløsum so hon gánaði og snerkti hvørja ferð hon hugdi upp. Tað gjørdi alt eyvita nógv verrið.
Men men innan fyr rukkurnar og lyvraplettarnar var fastur yngri enn nógvar yngri eg kendi.
Bannið uppá at sinnalagi og blusin matsjaðu.
Tað var bara henda vælsignaða húðin sum gjørdi at ikki sást longur inn. Tað sást ikki inná botn, og tað var spell. Hon var so ung í tí at hon hevði garantera gingi í g-strongi hevði hon ikki ræðst so illa mostir